## Ivi um Ferdinand

Rio Ferdinand hjá Manchester United noyddist skaddur av vøllinum, tá teir í gjár spældu hálvfinalu móti Arsenal. Talan var um kroyst rivjabein, og tað kann í ringasta føri bera steðg upp á fleiri vikur við sær. - Sjálvandi vóna vit, at at einki er brotið, men í ringasta føri kann hetta merkja ein steðg upp á tvær til tríggjar vikur, segði Sir Alex Ferguson við ensku miðlarnar



## Nýggjur landsliðsvenjari

Fyrrverandi rumenski landsliðsvenjarin, Victor Piturca fekk sekkjin tann 9. apríl, tí Rumenia ikki fekk nóg nøktandi úrslit í HM-undankappingini. Einasti sigurin var 1-0 sigurin ímóti Føroyum á Tórsvølli. Avloysarin er funnin, og er talan um tann 40 ára gamla Razvan Lucescu. Lucescu hevur verið venjari hjá felagnum, Brasov í nógv ár. Lucescu hevur skrivað undir ein 2 1/2 ára sáttmála. Rumenia liggur næstniðast í HM-undankappingarbólkinum við bert fýra stigum fyri fimm dystir. Niðast eru Føroyar við einum stigi.

# Vælmannað landslið í judo

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð er oyggjaleikalandsliðið í judo so væl mannað, at tveir íðkarar eru í hvørjum vektbólki. Talan er um eitt blandað lið við bæði yngri og royndari íðkarum**

JUDO
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast eingin kvinna er á liðnum hesa ferð, so er tað eydnast at fáa sett saman breiðasta judohópin nakrantíð, nú landsliðið til Oyggjaleikirnar á Álandi er úttikið. Har eru nevniliga tveir íðkarar í hvørjum vektbólki, og tað hevur tað ongantíð verið fyrr.

– Eg haldi, at vit hava eitt rættiliga spennandi lið, har nakrir eru heilt ungir og so nakrir veteranar. Sum liðið sær út, hava vit góðar vónir til leikirnar í summar, sigur Sofus D. Johannesen, formaður í Judosambandinum.

– Síðst høvdu vit eina kvinnu við, men tað hava vit ikki hesa ferð. Vit hava nakrar góðar og evnaríkar gentur, men tær eru í so ungar enn, so hesa ferð hava vit eitt reint manslið, sum enntá er sera væl mannað.

Mest merkisverda navnið er Sam Vang, sum vit eisini hava samrøðu við í blaðnum í dag, tí hann er farin í gongd aftur við judo, sum hann annars einki hevur gjørt við í átta ár. Hann er ein av veteranunum, sum síðst í 80-unum og nakað inn í 90-ini vann tvey gull- og tvey silvurmerki á oyggjaleikum.

### Yngri og eldri

Fimm av teimum, sum eru við hesa ferð, vóru eisini við á Rhodos fyri tveimum árum síðani, tá Jógvan Páll Kristiansen, Hjalmar Johannesen, Búgvi Poulsen og Ragnar við Streym vunnu silvur og Petur Sigurð Johannesen vann bronsu.

Ein av teimum, Búgvi Poulsen, sum eisini er ein av veteranunum við gullmerkjum frá leikunum í 1993 og 1995, var annars um reppið at noyðast at geva avboð, tí hann skuldi upp til onkra roynd. Men tað vísti seg, at royndin fall beint áðrenn Oyggjaleikirnar, so hann nær akkurát at koma við.

Tað er forrestin ikki bara Sam Vang, sum er byrjaður at íðka judo aftur eftir drúgvan steðg, tí tað er eisini galdandi fyri Skarpheðin Njálsson og Olaf Andreasen, sum tó ongantíð hava verið við til Oyggjaleikir fyrr.

– At venja manningina hava vit so Zvonko Mrdal, sum er fyrrverandi unglingameistari úr Jugoslavia. Hann hevur búð í Føroyum í 20 ár og kennir alt til okkara viðurskifti, men samstundis hevur nakað at geva frá tí eyðkenda eystureuropeiska ítróttarskúlanum, sigur Sofus D. Johannesen.

– Hann gongur høgt upp í tað og setir stór krøv, men íðkararnir eru sera glaðir fyri hann sum venjara, tí teir eru greiðir yvir, at nógv og hart arbeiði skal til, skalt tú røkka teimum bestu úrslitunum.

Í yvirlitinum yvir íðkararnar kann síggjast, hvørjir fyrr hava vunnið gull-, silvur- ella bronsumerki á undanfarnum oyggjaleikum.



*Á Álandi mest sum regnaði við heiðursmerkjum til føroyska judolandsliðið. Fimm av íðkarunum eru framvegis partur av føroyska landsliðnum, nú farið verður til Álands um knappar tveir mánaðir*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

**Judoíðkarar**

| Vektbólkur | Navn | Felag | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|---|---|
| Menn ÷60 kg | Nicolaj Skoubo | Sunda Judofelag | | | |
| | Sam Vang | Sunda Judofelag | 2 | 2 | |
| Menn ÷66 kg | Búgvi Hanusarsson Hansen | Sunda Judofelag | | | |
| | Sigurd Bjørn Mørkøre | Sunda Judofelag | | | |
| Menn ÷73 kg | Hjalmar Johannesen | Sunda Judofelag | | 1 | |
| | Jógvan Páll Kristiansen | Sunda Judofelag | | 1 | |
| Menn ÷81 kg | Búgvi Poulsen | Havnar Judofelag | 2 | 1 | |
| | Áki Davidsen | Havnar Judofelag | | | |
| Menn ÷90 kg | Bjørn Andreasen | Sunda Judofelag | | | |
| | Nicolai Mohr Vang | Havnar Judofelag | | | |
| Menn ÷100 kg | Petur Sigurð Johannesen | Sunda Judofelag | | | 1 |
| | Ragnar við Streym | Sunda Judofelag | | 1 | |
| Menn +100 kg | Skarpheðin Njálsson | Havnar Judofelag | | | |
| | Olaf Andreasen | Havnar Judofelag | | | |
| Venjari | Zvonko Mrdalo | | | | |

# Arsenal slapp væl frá fyrru hálvfinaluni

**Manchester United umsetti bert ein málmøguleika, og Arsenal hevur ein góðan møguleika at venda gongdini heima á Emirates Leikvøllinum í London**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Arsenal kundi fara rættiliga væl nøgdir av vøllinum, aftaná fyrru hálvfinaluna á Old Trafford ígjár, sum Manchester United vann 1-0. Arsenal vóru trýstir ein stóran part av dystinum, men takka verið einum góðum málverja, Manuel Almunia og nakað av hepni, so eydnaðist tað Londonliðnum at ríða ein stóran part av storminum av, og sleppa frá útidystinum við einum 1-0 tapi. Almunia bjargaði góðum royndum frá Wayne Rooney, Carlos Tevez og Christiano Ronaldo. Tað vóru bert tvær royndir, sum Almunia ikki megnaði at halda. Tá John O´Shea meddaði bóltin í netið, megnaði Almunia bert at hálvbjarga skotinum á vegnum. Almunia var eisini seldur, tá eitt kavandi skot frá Christiano Ronaldo rakti yvirleggjaran í øðrum hálvleiki. Men eingin ivi um, at Arsenal sær ein stóran møguleika at venda gongdini í heimadystinum týskvøldið, og tá verður Robin van Persie eisini klárur aftur.

### Tevez framum Berbatov

Róð var uppundir, at United-venjarin, Alex Ferguson fór at byrja inni við bæði Wayne Rooney, Christiano Ronaldo, Carlos Tevez og Dimitar Berbatov. Men Ferguson valdi at byrja við Tevez, og lata Berbatov sita á beinkinum fyrst. Tevez arbeiddi sera hart teir 65 minuttirnar hann var inni. Almunia í Arsenal-málinum mátti longu vísa sínar dygdir tá hálvurannar minuttur var farin, tá hann fekk beint einum vandamiklum stútara frá Wayne Rooney út til hornaspark. Arsenal vóru trýstir, og ein duppultbjarging hjá Almunia mátti til, fyri at verja fyri atsóknum hjá Tevez. Tá 18 minuttir vóru farnir, mátti Arsenal boyggja seg fyri trýstinum. Arsenal megnaði ikki at rudda eitt hornaspark burtur. Eitt innlegg hjá Michael Carrick var avrættað av Mikael Silvestre. Bólturin endaði hjá John O´Shea, sum við einum hørðum skoti meddaði til. Skotið var so hart og gott, at Almunia megnaði ikki at steðga tí. Almunia var ógvuliga eyðsýndur allan dystin, og hann hevði eina rimmarbjarging í 28. minutti, tá Ronaldo royndi seg við einum stútara.

### Frægari

Tað sá frægari út hjá Arsenal, aftaná steðgin. Og tá ein góður tími var farin hevði Emanuel Adebayor eina góða roynd, sum tó fór uppum málið. Løtu seinni skeyt Ronaldo eitt frálíkt langskot á yvirleggjaran hjá Arsenal. Almunia kundi bert standa og eygleiða bóltin tá. Arsenal-venjarin, Arsene Wenger skifti Theo Walcott og Emanuel Adebayor út, og setti Nicklas Bendtner og Eduardo á vøllin. Men teir broyttu ikki nógv uppá myndina. Men tá alt var liðugt stóð bert 1-0 á talvuni, og nógv kann henda á Emirates Leikvøllinum týskvøldið, tá Arsenal skal fram á vøllin.